Sosialurin

Nr. 48 - 10. mars 2010






*Bilurin er við í danska barnafimleikabólkinum Flying Superkids*




*Lars Godbersen frá Flying Superkids*

# Chevrolet við í Flying Superkids

**Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10**

Danski barnafimleikabólkinum Flying Superkids hevur ein Chevrolet frá 1958 við í sínum framførslum, har tey dansa, syngja og flúgva.

Fleiri hava helst lagt til merkis ein flottan gamlan amerikanskan bil frá 50-unum við donskum nummarplátum, sum seinastu dagarnar hevur koyrt á føroysku vegum.

Talan er um ein Chevrolet Brookwood frá 1958 bil hjá danska barnafimleikabólkinum Flying Superkids, sum skulu framføra í Ítróttarhøllini á Hálsi 30. og 31. mars. Bilurin er við í framførsluni, og verður hann brúktur sum bukkur hjá børnunum at loypa uppum.

Flying Superkids byrjaðu í 1967 sum eitt vanligt fimleikalið og síðani hevur bólkurin ment seg til eitt altjóða viðurkent framsýningarlið, har børnini dansa, syngja og flúgva.

Í Bilradio á Rás2 hósdagin sigur Lars Godbersen frá Flying Superkids frá søguni um bilin.

**mg**



*Chevrolet Brookwood frá 1958*

# Lada gevast í Danmark

Russisku Lada verða nú ikki seldir í Danmark meira.

Eftir at danski importørurin Nic. Christiansen A/S í Kolding ikki hevur selt ein einasta Lada seinastu tvey árini, er nú avger tikin um at lata Lada Danmark A/S aftur og gevast við at selja Lada. Seinastu 10 árini er seldir umleið 300 Lada bilar.

Lada vóru nógv seldir í Danmark og eisini í Føroyum í 80-unum. Talan var um Lada við sama bilmodelli sum Fiat 124, men við Lada motori og teknikki. Lada verða tó framvegis seldir í Týsklandi við modellunum Kalina, Priora og Niva.



*Lada Niva hava verið gjørdir síðan 1977*




*Lada frá 80-unum við Fiat modelli*



*Konseptbilurin Lada C Concept*